

# NSÍ CUP 2001

NSÍ skipar fyri innandurakapping í ítróttarhøllini í Runavík í døgunum 14. og 15. desember 2001.

Aldursbólkar:

| | |
|---|---|
| · Pinkur | 1992-1993 |
| · Gentur 10-12 ár | 1990-1991 |
| · Smágentur 12-14 ár | 1988-1989 |
| · Pinkulingar | 1994-1995 |
| · Smápiltar | 1992-1993 |
| · Piltar | 1990-1991 |
| · Smádreingir | 1988-1989 |
| · Dreingir | 1986-1987 |

Aldursbólkarnir: pinkulingar, smápiltar, piltar, smádreingir, pinkur, gentur 10-12 ár og smágenmtur 12-14 ár, leika við 4 útileikarum og málmanni + eyka leikara.

Aldursbólkurin: dreingir, hava 4 útileikarar + eykaleikarar.

Liðini skulu hava fótbóltsnøvn (FCK - Newcastle - NSÍ).

Luttøkugjaldið er kr. 200,- fyri hvørt liðið.

Boðast skal frá tilmelding mánakvøldið 10.12.2001 ella týskvøldið 11.12.2001 millum kl. 19.00-22.00 á tlf. 44 81 00 ella 25 48 52

NSÍ

---

LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Tekniskt hjálparfólk

Søkt verður eftir ungum fólki til havnadeild okkara at taka sær av eftirliti, viðlíkahaldi og innsavning av dátum í sambandi við vind-, aldu- og streym-mátingar.

Tað kann vera ein fyrimunur, at umsøkjarin hevur støddfrøðiligt studentsprógv e.l., og tað er ein treyt, at hann/hon hevur tøkniligan áhuga og gott innlit á telduøkinum.

Neyðugt er, at umsøkjarin hevur koyrikort.

Umsókn verður at senda **Landsverkfrøðinginum, Postboks 78, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 10. desember 2001.**

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast á **tlf. 311333, lokal 316.**

---

# Lastbilar til sølu

Um hóskandi boð fæst, verða hesir lastbilarnir seldir:

**Volvo F12** 8x2, árg. 85, við NCH ISO 2000 weirheis komb. til 20 fót bingjur.

**Volvo F12** 6x2, árg. 84, trekkjari við hydraulikki.

**Scania 82** 6x2, árg. 84, við innilokaðari last við pres-sendingum.

Nærri fæst at vita á **tlf. 211047**

**Pf. Heri Thomsen**
Postboks 9
FO-510 Gøtu

---

# 2 pedagogar til Dagstovnin á Oyri

**Søkt verður eftir:**
1 pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna í vøggustovuni, at byrja 1. februar ella eftir nærri avtalu.

1 pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna í Stórustovu, at byrja 1. februar ella eftir nærri avtalu. Starvið er fyribils eitt ár, við møguleika at halda fram á stovninum.

Dagstovnurin er normeraður til 40 børn uppdeild í 3 bólkar:

| | | |
|---|---|---|
| Stórustova | 17 børn | 4-7 ár |
| Innistova | 9 børn | 3-4 ár |
| Vøggustovan | 14 børn | 0-3 ár |

og vit eru 5 pedagogar og 6 hjálparfólk, sum stravast á stovninum.

Vit liggja í náttúruvinarligum umhvørvi við haga og fjøru og leggja stóran dent á at nýta hetta í gerandisdegnum.

Starvið verður lønt sambært sáttmála við Peda-gogfelagið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leið-aran Rosu Prestá á **tlf. 422552** ella á **tlf. 227852**.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum við-mælum, skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 21. desember og sendast til

SUNDA KOMMUNA

**Dagstovnin á Oyri**
450 Oyri

---

P/F BYGGITEK

# Gravimaskina

Liebherr 942 til sølu.

**Tlf. 317585**

---

# Handverkarar

Til framleiðslu okkara søkja vit eftir handverkarum at byrja skótast gjørligt.

Arbeiðið fevnir mest um framleiðslu av útgerð úr rustfríum stáli.

Nomatek arbeiðir innan projektering og framleiðslu av útgerð til fiskivinnuna.

Við Sandá • Postmoga 1116 • Fo-110 Tórshavn
Tel. 356900 • Fax. 356901

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pedagogar til dagstovnin í Øksnagerði

Tórshavar kommuna søkir við hesum eftir pedagogum til Dagstovnin á Fløtum at byrja 15. januar 2002 ella eftir avtalu.

**Størvini**
talan er um:
- 1 varaleiðara 40 tímar um vikuna
- 1 pedagog, 40 tímar um vikuna til barnagarðsstovu, og
- 1 pedagog til barnagarðs/serstovu 40 tímar um vikuna.

**Stovnslýsing**
Dagstovnurin í Øksnagerði er normeraður til 40 barnagarðsbørn, 20 tvey ára gomul børn og eina stovu við 12 børnum, sum eisini hýsir børnum við serligum tørvi.

**Vit bjóða**
trý áhugaverd størv, har tit saman við leiðaranum fáa møguleika fyri at seta tykkara dám á stovnin og vera við í øllum tí, sum skal til, fyri at stovnurin skal virka eftir ætlan.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin:
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- kann arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- saman við starvsfólkunum verður við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- hevur hugsjónir, tá tað snýr seg um virksemið í einum barnagarði, sum eisini hýsir børnum við serligum tørvi
- dugir væl at samskifta, bæði innan-og uttanhýsis
- er kreativ/ur
- dámar væl at íðka ítrótt saman við børnunum
- dámar væl at vera úti í náttúruni við børnunum
- dugir at síggja møguleikar fram um forðingar

**Setunarviðurskifti**
størvini verða sett umleið 15. januar 2001 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri. Setanarsamrøður verða 20. desember.

**Meir fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Jesper Roos Nielsen, leiðara, tlf. 31 99 59/ 21 99 59, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 315160.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møgulig viðmæli skulu vera Dagstovninum í Øksnagerði, Øksnagerð 1, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 19. desember 2001.

SNARSKIVAN

---

# Skrivstovunæmingur

Søkt verður eftir skrivstovunæmingi at byrja 1. januar 2002. Vit roknað við, at tú hevur FHS, HH ella tilsvarandi prógv.

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 20. desember.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Tórhall Thomsen, tlf. 211047

**Pf. Heri Thomsen**
Postboks 9
FO- 510 Gøtu



TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

## Søkt verður eftir
# lærara til timburdeildina

Starvið er fulltíðarstarv. Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum húsasmiður, og hava minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið. Umsøkjarar við hægri útbúgving hava fyrimun.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landstýrið og FTL.

Tann, ið settur verður, skal byrja í starvinum 1. januar 2002.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal verða skúlanum í hendi í seinasta lagi 12. des. 2001.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til skúlan, tlf. 311957

**Tekniski skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75, Postmoga 239
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311957, telefaks 316621
E-post: tst@tst.fo

---

# Skrivstovufólk

Søkt verður eftir fólki at arbeiða í 1/2 tíð hjá Tórs-havnar havn.

**Arbeiðsuppgávur:**
Útrokning av vørugjaldi
Journalisering (DocuLive)
Telefonavgreiðsla
Skrivligt samskifti
Annað skrivstovuarbeiði

**Setanarviðurskiftir:**
Starvið verður sett 1. januar 2001 ella skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Kommunala Ar-beiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Jónsvein Lamhauge tlf. 31 17 62

Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu vera Tórshavnar havn, Postboks 103, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 17. desember 2001.

**Tórshavnar havn**

---

# Fólk søkist

til grillbar, skiftandi og fastar vaktir at velja ímillum.

**Grill 2000**
Per Mohrsvegur 7
Tlf. 322003 – 213388

---

**Mentamálastýrið**
*Vinnu- og Miðnámsskúladeildin*

# Undirvísingarleiðari

## (Sjómansskúlarnir og Maskinmeistaraskúlin)

**Starvið**
Nú undirvísingarleiðari okkara fer úr starvi er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum undirvísingarleið-ari leyst at søkja í Vinnu- og Miðnámsskúladeildini.

**Høvuðsuppgávurnar hjá undirvísingarleiðaran-um verða m.a. at:**
- Leggja til rættis og menna útbúgvingarnar serliga innan tað maritima økið
- Ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- Málsviðgerð
- Luttaka í verkætlanum t.d. innan dygdarmenning, bæði á stovnum undir stýrinum og innanhýsis. Har-umfram kunnu nevnast útbúgvingar til eina møguliga framtíðar oljuvinnu
- Samskipa virksemi við tilknýti til økið við aðrar deildir, stovnar og áhugafelagsskapir
- Fremja samstarv við vinnulívið o.o., ið varða av økinum

Undirvísingarleiðarin skal tryggja, at nevndu upp-gávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdir eru í samsvar við nútímans krøv.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a. at umsøkjarnir hava
- Viðkomandi hægri útbúgving
- Áhuga fyri at arbeiða við dygdarmenning (kvalitetssikring). Kunnleiki til hetta øki gevur fyrimun
- Góð samstarvsevni og hug at arbeiða í bólkum
- Førleika at menna samstarvið við vinnulívið og áhugafelagsskapir
- Áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggj-ar leiðir

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi og møgu-leikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi tætt saman við politisku myndugleikunum og stovn-um innan undirvísing og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjar-málastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalstýrini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

**Mentamálastýrið**
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. desember 2001.

Starvið verður sett skjótast til ber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Eyðgunn Samuelsen, deildarstjóra, á tlf. 355050.

***Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Øki hjá Vinnu- og Miðnámsskúladeildini** umfatar studentaskúlarnar, HF-skeiðini, handilsskúlarnir, teknisku skúlarnir, Fiskivinnuskúlan, sjómansskúlarnir, Maskinmeistaraskúlan og lærlingaútbúgvingar.*

---

# Kvinna søkist til handil

Vit sóknast eftir tilkomnari kvinnu til handilin at byrja 2. januar 2002.

**Arbeiðtíðirnar eru hesar:**
kl. 05.30 - 13.15
kl. 13.00 - 19.00
allar dagar í vikuni

**Frants Restorff**
Tórsgøta 13
Tlf. 311060
Postmoga 41
110 Tórshavn

frants restorff

---

# Nýtt Nýtt...

## Grill 2000 er opnað.
**Í tí sambandi hevur Video 2000 tilboð allan desember mánað**

| | | |
|---|---|---|
| Leiga | 1 film | fyri 25,- |
| ella | | |
| leiga | 3 filmar | fyri 60,- |

**Video & Grill 2000**
Per Mohrsvegur 7
188 Hoyvík
Tlf. 322003 · Fax 316290